

# Livið sum MILLIÓNINGAR í tríggjar dagar

## Luksusferð við Norrönu – við lummapengum

Hugsa tær. Eina ferð við Norrønu, har tú og makin kunnu njóta ekslusivu atmosferuna í suituni á glæsiliga ferðamannaskipi føroyinga. »Jú, men tað kostar« vilja summi helst halda, men tað nýtist nú ikki at kosta so nógv.

Saman við Smyril Line og Føroya Sparikassa gevur Sosialurin nevnliga tær møguleikan at fara á dreymaferðina. Ferðast sjálvur annar á eini av rutunum hjá Smyril Line við øllum tí marglæti, sum stóra ★★★ ferðamannaskipið gevur tær.

Og tað er ikki nóg mikið við tí. Umborð á Norrønu hevur tú eisini sersømdir, tí Føroya Sparikassi gevur tær eina konto umborð, har tú kanst nýta upp til 10.000 kr. á ferðini. So skuldu ráðini verið til bæði eitt og annað.

Umframt høvuðsvinningin, verður eisini ein eykavinningur drigin. Hesin er ein ferð fyri tvey vaksin og tvey børn við bili til Danland í Blokkhus í eina viku.

Og tað er sera einfalt at vera við í kappingini. Sjey leygardagar á rað verður spurnarblað í Sosialinum, har tríggir spurningar skulu svarast. Fyrsta spurnarblaðið var í blaðnum 11. september, og er talan hesaferð sostatt um næsta umfarið. Tá øll spurnarbløðini eru svarað, skulu hesi sendast okkum í einum brævbjálva. Brævbjálvin skal merkjast »dreymaferð« og skal sendast til:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Bert seðlar, sum eru kliptir úr Sosialinum kunnu vera við í kappingini. Loyvt er ikki at senda avrit av seðlum.

Saman við svarlepanum skulu vit hava upplýsingar um navn, bústað og tlf. nummari hjá tær. Svarleparnir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 27. oktober, og leygardagin, 30. oktober verður so almannakunngjørt, hvørji eru hepnu vinnararnir.




Sosialurin

**DREYMAFERÐIN 5. UMFAR**

Hesaferð snúgva spurningarnir seg meira ella minni um almenna vitan

**1** Hvør er sjónvarpsstjóri?

**2** Hvør er stjóri á Rás 2?

**3** Hvør er útvarpsstjóri?

FØROYAPRENT - TEL. 314 555



magenta svart

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møti, Eyðun og Irena Christiansen tala og leiða á báðum møtunum, har øll eru vælkomin. Sunnudagsskúlin og skótar hava heystfrí.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Regin Olsen.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Egil Joensen.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Messa í Kerit.
Hóskvøldið kl. 20.00 verður Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa v/ William Kenny, biskupi, Gøteborg, í Mariukirkjuni.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron Vestmanna**
Morgunmøti verður sunnudagin klokkan 11.00 við breyðbróting.
Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Missiónshúsið í Kollafirði**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúlí, kl. 18 Møti.
Týsdagin kl. 20 Bíbliutími Aps. kap. 6. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Ongin sunnudagsskúli sunnudagin og onki møti vegna konfirmatión.

**Aglow, Eysturoy**
Fundur verður í Hæddini í Saltangará leygardagin kl. 15.00.
Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Á møtinum kl. 18 verður dópur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Nerija, Skála**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 12.30 sunnudagsskúli.
Kl. 17 Møti við vitjan úr Lívdini í Havn, Jógvan Zachariasen talar.

**Keldan í Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00: AWAKE við Eyðun Jacobsen.
Sunnudagin kl. 17.00: Evangeliskt møti við Maibritt og Tummas Jákup. Sangur við Bill Justinussen. Barnamøti kl. 17.00.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20 við Hans Kristian Justesen. Øll eruhjartaliga vælkomin.

**Hugnaløta**
Leygarkvøldið kl. 20 Hugnaløta við sangi og vitnisburði í felagshølunum hjá Hæddini í Saltangará. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Møti við skála fólki. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20 við Hans Kristian Justesen, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Møtirøðin í sambandi við 80 ára føðingardagin heldur áfram við møti í kvøld kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00. Finn Bjarnastein talar á øllum møtunum. Eisini koma hann og konan, Sygni, at syngja. Drekka verður hvørt kvøld, og sunnukvøldið verður nátturði.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Marius Jacobsen. Ungdómsmøti kl. 21.
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Ongin sunnudagsskúli og onki møti sunnudagin.

**KFUM & K Klaksvík**
Sunnudagin kl.14.00: Sunnudagsskúli. Kl.17.30: Bønarløta. Kl.18.00: Møti.
Kl. 21.00: Ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti við Øssur Kjølbro. Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Eingin sunnudagsskúli vegna heystfrí.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við John Myllhamar. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Evangeliskt møti. Sámal Jákup Joensentalar. Bønarmøti kl. 17.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti.
Mánakvøldið kl. 21.00: Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og Uppbyggingarfundur.

**Ísraelsvinir**
skipa fyri stuðulskonsert til frama fyri neyðstødd og fátæk í Ísrael, í Læraraskúlahøllini leygarkvøldið 9. okt. kl. 20.00. Anna D. Háberg, Gunnar Mikkelsen og Havnarkórið syngja.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30.
Leygarkvøldið 6. nov. hugnakvøld v/ Bjarna Bæk, dómprósti.
Sunnudagin 7. nov. kl. 15 Gudstænasta í Háteigskirkju v/ Bjarna Bæk, dómprósti.
Aftaná verður kaffi í Ørkini.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum, tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 11. oktober*
Vit spæla Boccia
*Týsdagin 12. oktober*
Stongt vegna útleigan av húsinum
*Mikudagin 13. oktober*
Kvøldseta kl. 18, smurt breyð og felagssangur, Ingelise Guldborg Sørensen fysioterapeutur heldur fyrilestur um evnið: Týdningurin av motión og rørslu.
*Hósdagin 14. oktober*
Prát og sangur
*Fríggjadagin 15. oktober*
Opið hús

Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.


STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur til plan- og prosjektdeildina

Søkt verður eftir verkfrøðingi ella líknandi til plan- og prosjektdeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast.

Plan- og prosjektdeildin er deild undir vegadeildini.

Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri:
- Gera ætlanir fyri trygdartiltøk
- Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving og við royndum innan omanfyri nevndu virkisøki. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.

**Setanarviðurskifti**
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:

Landsverk
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. oktober 2004.
Merkið brævbjálvan "Verkfrøðingur til vegadeildina".
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Finnleifi Durhuus, leiðari av vegadeildini, á tel. 31 13 33, teldupostur: finnleif@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postmoga 78, Tórshavn,
Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo
LANDSVERK byggir land

www.sansir.fo



**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Leygardagin 09.10. kl. 20$^{45}$
Leygardagin 09.10. kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 10.10. kl. 19$^{45}$
Sunnudagin 10.10. kl. 22$^{30}$



Leygardagin 09.10. kl. 19$^{00}$
Leygardagin 09.10. kl. 21$^{15}$
Sunnudagin 10.10. kl. 18$^{00}$
Sunnudagin 10.10. kl. 20$^{15}$



Leygardagin 09.10. kl. 17$^{00}$
Sunnudagin 10.10. kl. 16$^{00}$



Leygardagin 09.10. kl. 23$^{00}$
Sunnudagin 10.10. kl. 22$^{00}$



Leygardagin 09.10. kl. 18$^{30}$
Sunnudagin 10.10. kl. 17$^{30}$




